# Innanhýsis trupulleiki

**Fólkaflokkurin hevur biðið Tjóðveldisflokkin um at fáa skil á sínum innanhýsis leiðslu trupulleika í sambandi við ákærurnar hjá Tórbirni Jacobsen móti løgmanni, Anfinn Kallsberg, og støðan er nú aftur fastløst**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*— Vit samdust um at fara til Tjóðveldisflokkin, tí vit kunnu ikki góðtaka hesar ákærurnar og svarið, vit fingu. Ákærurnar kunnu ikki blíva hangandi, sigur Óli Breckmann, formaður fyri tingbólk Fólkafloksins*

Tað er synd at siga, at tað hevur verið gott veður hjá samgonguni, síðani hon tók við broyttari manning, eftir drúgvar samráðingar eftir løgtingsvalið. Tingið hevur líka verið saman fyri at velja formann og nevndir, men annars hevur nýggja tingið enn ikki verið saman, men hevur verið í summarfrí. Á ólavsøku byrjar nýggj tingseta, og tá verður eisini løgmansrøðan á skránni, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður, fer at halda. Í salinum verður øll samgongan – eisini Tórbjørn Jacobsen, sum hevur verið spírin til hetta nýkomna stríðið, sum hevur stungið seg upp.

Tey flestu kenna søguna, so vit endurtaka hana ikki meira enn neyðugt. Í skrivandi stund er støðan tann, at Fólkaflokkurin hevur sent Tjóðveldisflokkurin enn eitt skriv, har funnist verður at úttalilsunum hjá Tórbirni Jacobsen um løgmann og Jørgen Niclasen, landsstýrismann.

— Vit samdust um at fara til Tjóðveldisflokkin, tí vit kunnu ikki góðtaka hesar ákærurnar og svarið, vit fingu. Ákærurnar kunnu ikki blíva hangandi, sigur Óli Breckmann, formaður fyri tingbólk Fólkafloksins.

## Halda fram

Óli Breckmann sigur, at teir eisini hava sent á eina skrivliga áheitan til Tjóðveldisflokkin um at taka fat um tann – sum hann kallar tað - leiðslutrupulleiki í Tjóðveldisflokkin, sum er vorðin ein trupulleiki fyri samgonguna.

Tá vit spyrja Óli Breckmann, um hann Fólkaflokkurin nú angrar, at hann fór í hesa samgonguna, svarar hann:

— Vit eru farnir í eina samgongu fyri at kunna halda fram í einum konstruktivum samstarvi á sjálvstýrisleið. Vil Tjóðveldisflokkurin ikki hava hesa samgonguna, so skulu teir bara halda fram við at tíggja sær, sum tær hava gjørt, so heldur hon skjótt uppat. Ein sovorðið samstarv forbjóðar seg sjálvt, sigur Óli Breckmann.

Hann sigur, at teir hava ongan sum helst iva um, at Tjóðveldisflokkurin er sinnaður til hetta samstarvið og er til reiðar, at gera tað, ið skal til fyri at tryggja samstarvið. Hann leggur afturat, at løgmaður og flokkurin ikki kunnu liva við støðuni, sum hon er nú.

## Ótolandi

Òli Breckmann roynir ikki at skava útyvir, at hann heldur ógvuliga lítið, um atburðin hjá Tórbirni Jacobsen í løtuni.

Óli Breckmann heldur tað hava stóran týdning, at samgongan finnur stevið aftur beinanvegin, nú ólavsøkan eisini nærkast.

— Tað er fullkomiliga burturvið, at løgmaður skal fara at stevna einum vanligum tingmanni. Tað ber als ikki til, at liva í einari samgongu, har ein sovorðin brølandi løva setur dagsskránna, sigur Òli Breckmann.

# So leikandi lætt

ÓLAVSØKA
*Ingrid Bjarnastein*

Ólavsøkukabarettin er ikki bara sjónleikur. Nei, har eru sanniliga eisini tónleikarar, sum gera sítt til, at kabarettin verður til tað, sum hon er.

Tónleikararnir í ár eita Bartal Højgaard, Fríði Øster, Rúni Eysturlíð og Janus Kampmann. Teir eru allir útisetar, men fleiri av teimum hava spælt saman í kabarettini upp í fimm ferðir fyrr, og allir fýra hava spælt til kabarettina fyrr, so hesir ungu menninir eru gamlir í garði.

– Vit spæla ikki saman vanligt, men vit eru so væl fyrireikaðir í ár, sum ongantíð fyrr, siga teir fýra tónleikararnir.

Og í ár er nakað nýtt hent við tónleikarunum. Ístaðin fyri at standa kroystir í einum horni niðri á gólvinum, eru teir slopnir uppá pallin at spæla, og tað eru teir ógvuliga glaðir fyri. Teir vísa eisini á, at hetta er tann kabarettin, sum er tekniskt og praktiskt best fyri.

– Hjá okkum verður spælt uppá kommando. Vit spæla tíðaraktuellan tónleik, mest kend løg, men so eisini okkurt, sum er gjørt til høvið, so vit eru ógvuliga spentir uppá, hvussu tað fer at ganga.

Spurdir um, hví teir tíma at spæla til kabarettina var svarið greitt:

– Hetta er vorðið til ein part av okkara ólavsøku eftirhondini.

Teir siga, at tað at spæla til ólavsøkukabarett er so nógv av eini avbjóðing, sum ein sjálvur ger tað til.

– Um tú ger tær ómak við at fáa tað at ljóða so væl sum møguligt, og spælir so væl sum tú kann, so er tað ein avbjóðing í sær sjálvum, siga teir. – Tað er eisini stuttligari at spæla við sjónleikarum enn við sangarum, siga teir flennandi at enda.



*Teir fýra, Bartal Højgaard, Fríði Øster, Rúni Eysturlíð og Janus Kampmann, eru tónleikararnir til ólavsøkukabarettina*
*Mynd: Finnur Justinussen*



Kendir filmsframleiðarar til Føroya:

# Ætla at gera nýggjan føroyskan barnafilm

**Tveir úrmælingar innan danska filmsframleiðslu koma í næstu viku til Føroya á arbeiðsferð. Teir skulu kanna møguleikan fyri at gera barnafilm úr Føroyum**

FILMUR
*Eyðun Klakstein*

Fyrsta dagin í august lenda tveir kendir danskir filmsmenn í Føroyum. Teir koma á arbeiðsferð til Føroya, og endamálið við ferðini er at kanna møguleikarnar fyri at gera ein norðurlendskan barnafilm úr Føroyum.

Annar av monnunum er Hans Hansen, sum bæði hevur skrivað bøkur og leikstjórnað filmum. Hann er maðurin aftan fyri kendar danskar filmar sum »Gummi Tarzan« og »Vil du se min smukke navle«. Hans Hansen hevur nú tilknýti til kenda framleiðslufelagið Zentropa, har Lars von Trier eisini húsast.

Hin maðurin á ferðini hevur ikki havt minni týdning fyri framleiðsluni av donskum barnafilmum, tí hann er fyrrverandi stjórin í Nordisk Film Junior. Ulrik Breuning hevur verið við til at gjørt eitt ótal av donskum filmum, og hann verður mettur sum ein stórt navn í danska filmsheiminum.



*Menninir, sum hava staðið fyri filmunum um Trølla Pætur, arbeiða nú við eini størri ætlan um ein føroyskan spælifilm*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Danskur áhugi

Søgan aftan fyri ferðina hjá teimum báðum donsku filmsframleiðarunum er, at menninir aftan fyri filmarnar um Trølla Pætur í eina tíð hava sóknast eftir donskum filmsfólki at samstarva um ein stóran nýggjan føroyskan film. Talan verður tó ikki um ein nýggjan film um Trølla Pætur, men ein heilt øðrvísi barna- og ungdómsfilm, har trøll, álvar og aðrar verður verða ein partur av søgugongdini.

Høvuðsleikari í søguni skal tó verða ein vanligur føroyskur drongur, ið hevur eitt óvanligt tilknýti til tann heim, sum eingin vanliga ger sær fat um. Samanspæl ímillum tað náttúrliga og tað yvirnáttúrliga, kærleiki ímillum ung úr ymiskum londum, tvístøður ímillum ung og eldri, gott og ónt og nógvur góður upprunatónleikur er bert ein partur av tí, ið er at finna í hugskotið um nýggja norðurlendska barna- og ungdómsfilmin.

Nú er hendan ætlanini komin so langt ávegis, at tveir kendir filmsframleiðarar eru sinnaðir at vera við. Fyrsta útgáva av handritinum er gjørd, og verður nú farið undir at arbeiða meira við ætlanini, so tað kann eydnast at sleppa inn um hjá teimum, ið vilja fíggja slíkar verkætlanir.

– Vit hava verið í samband við nógv ymisk fólk og feløg innan danska filmslist, men Hans Hansen og Ulrik Breuning eru teir, sum hava sýnt størsta áhuga fyri hugskotinum, og tað eru vit sera fegnir um, tí burtur úr allari rúgvuni av framleiðarum, høvdu vit helst viljað havt teir, sigur Niklas Heri Jákupsson, sum er ein av føroysku stigtakarunum til ætlanina. Afturat Niklasi eru Jógvan Eliasen og Steintór Rasmussen mennirnir aftan fyri verkætlanina.

– At hesir báðir menninir eru vorðnir heitir fyri hugskotinum, beinir nógvar forðingar av vegnum, men enn er langur vegur á, áðrenn vit vita, um hugskotið kann gerast til veruleika, sigur hann.

## Koma at arbeiða

Trølla Pætur og hansara skyldfólk hava verið við í tveimum føroyskum filmum, sum seinastu árini eru givnir út á sjónbandi. Í løtuni eru upptøkurnar í gongd til triðja filmin, sum fer at koma út seinni í hesum árinum.

Menninir aftan fyri filmarnar um Trølla Pætur hava í eina tíð arbeitt við hugskotinum at gera ein størri føroyskan barnafilm, sum tó einki hevur við Trølla Pætur at gera.

Nú er hendan ætlanini komin so langt ávegis, at tveir kendir filmsframleiðarar eru sinnaðir at vera við.

– Eg sendi teimum eina skrá fyri Føroyaferðina, har eg hevði lagt onkrar útferðir inn, men tað bóðu teir meg bara gloyma, tí teir komu til Føroya at arbeiða og ikki at halda frí. Teir vilja heldur hitta fólk, fáa íblástur og fáa kunnleika til føroyska samfelagið, søgu og sagnir, sigur Niklas Heri Jákupsson.

Donsku filmsframleiðararnir koma til Føroya 1. august, og teir steðga í Føroyum í fimm dagar.

# Tobbi fer at spyrja um nevndarval

**Tórbjørn Jacobsen fer at seta Bjarna Djurholm ein skrivligan fyrispurning um valið av nevndarlimum í Framtaksgrunninum**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*



*– Gongur tú sum landsstýrismaður ímóti fakliga metingini, so er tað, at rotið í skipanini byrjar, sigur Tórbjørn Jacobsen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin*

Tórbjørn Jacobsen heldur, at landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur skapt so stóran iva um valið av fólki í almennar nevndir, at hann nú fer at seta skrivligan fyrispurning á løgtingið um nevndina í Framtaksgrunninum.

Tað, sum fær tingmannin fyri Tjóðveldisflokkin at gera hetta, er, at Bjarni Djurholm hevur sagt alment, at hann hevur næstan altíð fylgt tilráðingunum frá embætisfólki, tá hann hevur manna almennar nevndir.

At Bjarni Djurholm segði »næstan«, órógvar Tórbjørn Jacobsen.

– Tá landsstýrismaðurin sigur hetta, vil eg sum umboð fyri fólkið hava at vita, um hann fylgdi tilráðingini frá embætisverkinum, tá nevndin í Framtaksgrunninum varð vald, ella um tað bara var næstan, sigur Tórbjørn Jacobsen.

## Rotið byrjar við serligum atlitum

Tórbjørn Jacobsen hevur størsta áhuga í at fáa at vita um valið av nevndini til Framtaksgrunnin.

– Framtaksgrunnurin umsitir virði fyri næstan tvær milliardir, og tí hevur tað stóran týdning fyri meg at fáa at vita, um nevndin í grunninum er vald út frá eini fakligari meting, ella um landsstýrismaðurin kanska gekk ímóti fakligu metingini og tók partapolitisk atlit.

– Tilráðingar frá embætisfólkum í slíkum málum skulu fylgjast, um ikki okkurt heilt serligt kemur uppí, tí tilráðingarnar eru væl gjøgnumarbeiddar og byggja á fakligan førleika. Gongur tú sum landsstýrismaður ímóti fakliga metingini, so er tað, at rotið í skipanini byrjar, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann ætlar at seta Bjarna Djurholm skrivligan fyrispurning beinan vegin, tá tingið fer til arbeiðis aftur eftir ólavsøku.